# - Eg veit ikki um annað

**Mortan Johannesen, Mortan hjá Andriasi í Hvannasundi, hevur siglt eitt langt lív. Fyrstu ferð, hann fór til Grønlands, var hann bert 11 ára gamal. Tey mongu árini á sjónum hevur hann upplivað mangt og hvat, og eitt nú var hann staddur umborð á Fiskanesi á Kappanum í himmalsins ódnarveðri og ísi, tá Hans Hedtoft fórst í 1959. Teir hoyrdu neyðarkallið, men høvdu ongan møguleika at koma skipi og manning til hjálpar. Seinastu árini hevur Mortan verið útróðrarmaður, og her stórtrívist hann**



*- Gleðin við at rógva út kemur innanífrá. Hon sprýkir innast úr hjartanum. Tú kastar og heintar, og hvørja ferð er spenningurin líka stórur, sigur seksti fimm ára gamli Mortan Johannesen, ið ikki kundi hugsað sær annað í dag enn eitt lív sum útróðrarmaður*

SIGLING

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

Eigur tú heilsuna, orkar væl og hevur ein brennandi hug at søkja sjógvin, er seksti fimm ár eingin aldur. Tað heldur Mortan Johannesen, fyrrverandi skipari, skipaeigari, alari og seinastu árini útróðrarmaður, sum fylti seksti fimm mánadagin 17. september.

Mortan er giftur Ruth. Tey eiga trý børn, tvær døtur og ein son.

- Tað er gott, at tit skriva um fiskivinnu og fiski-og útróðrarmannin. Alt kann ikki snúgva seg um partabrøv, bankar, flogvallir, tunlar ella politiskt møsn. Vit eru nøkur, sum mugu hava annað at taka okkum fyri, um vit skulu liva og trívast. Nógvir uppilagstir skiparar hava bát, og einki er náttúrligari fyri okkum enn tað. Sjálvur kundi eg í dag ikki hugsað mær nakað annað enn at róð út, nú eg eri farin úr vinnulívinum. Gleðin við at rógva út kemur innanífrá. Hon sprýkir innast úr hjartanum. Tú kastar og heintar, og hvørja ferð er spenningurin, um nakar fiskur man vera at fáa, líka stórur. Kenslan av at føla tað liva millum fingrarnar, tá fiskur, sum komin er dekkið, verður krøktur av húkinum og blóðgaður, kann ikki forklárast. Hon má upplivast.

## Einsamallur á báti

Hin nú seksti fimm ára gamli góða og kendi skiparin hevur ongar ætlanir um at gevast við útróðrinum.

- Nei, so leingi eg orki og havi góða heilsu, fari eg at søkja sjógvin við AWI Star bátinum, Tvíburar. Tað er ikki tað sama nú, sum tá eg sum 27 ára gamal byrjaði at føra skip. Men eg kann ikki klaga, tí eg havi tað gott og føli meg væl.

Mortan roynir bara við snellu, og hann er altíð einsamallur á báti.

- Eg havi gjørt fleiri góðar túrar og havi eisini fingið upp í bátin. Tað mesta, eg havi havt í útróðrarbátinum, er 10.000 pund av upsa. Onkuntíð havi eg roynt upp í einar 3-4 dagar í senn, og eg havi eisini verið úti á Føroyabanka eins á Norðhavinum um várarnar.

Sjóvinnusøgan um mannin úr ættarliðnum eftir navnframa og tiltikna skiparan Mortan í Hvannasundi, er drúgv og hendingarrík, bæði í viðgongd og mótgongd. Tað er fáur ella eingin, sum søkir sjógvin og vinnulívið annars, ið bara hevur havt viðgongd.

## Ungur til skips

Longu sum 11 ára gamal fór Mortan fyrstu ferð til skips. Hetta var ein saltfiskatúrur í Grønlandi við gamla Kalsevni, sum pápi hansara, Andrias í Hvannasundi, førdi.

- Tað var Kymbil hjá Poul Hansen, ið átti skipið, og pápi sigldi hjá hesum felag í mong ár.

Hann ásannar, at tað var óvanligt, at so ungur drongur fór til skips, hóast hetta var um summarið.

- Pápi vildi líka sum hava meg vandan til sjólívið, og umborð á Kalsevni fekk eg eina góða kenslu av, hvussu menn stríðast og strevast á deksvaktini, sum vanliga vardi í 12 tímar. Frívaktin var 6 tímar.

Mortan sigur, at fiskiskapurin í Grønlandi hendan túrin var góður, og teir fingu upp í skipið eftir 20 daga roynd.

- Manningin umborð á Kalsevni var stak fitt, vinarlig og fryntlig, og eg føldi meg sum eina pisu. Teir skemtaðu, argaðu og hjálptu mær – hvørt um annað, tá okkurt var.

Eina stuttliga søgu minnist Mortan aftur úr Føroyingahavnini so ungur, sum hann var.

- Eg gekk niðri á dekkinum, tá eitt grønlendskt konufólk, sum gongur uppi á bryggjuni, byrjaði at floyta og rópa eftir mær. Eg fari til pápan og sigi sum er. Pápi sigur tá við meg: Nei, góði – far ikki í land til hasa damuna!

## Hans Hedtoft fórst

Barnaárini hjá Mortani gingu – og helst gingu tey heldur seint fyri hann, tí brennandi hugurin lá til sjógvin.

- Sum 16 ára gamal slapp eg í 1959 umborð á tá størsta og flottasta trolaran í flotanum, Fiskanes, sum pápi mín og brøður hansara áttu saman við Havsbrún. Tað vóru pápabeiggjarnir, Hans Pauli og Pole, sum skiftust um at føra skipið.

Mortan sigur, at teir høvdu fiskað á Kappanum, tá herviligt illveður brast á. Tað var nógvur ísur á leiðini eystur úr Kappanum, og hann skilir ikki tann dag í dag, hvussu tað ber til, at teir komu livandi burtur úr hesum.

- Tað var júst í hesum kavaroksstormi og ísi, at spildurnýggja ferðamanna- og farmaskipið, Hans Hedtoft, gekk burtur við 96 fólkum umborð. Vit vóru staddir einar 20 fjórðingar suður úr Kappanum. Vit sóu ikki skipið, tí tað var so nógv kavarok, men tað lá á somu leið sum vit. Um kvøldið sendu teir út neyðarkall, sum vit eisini hoyrdu. Men vit fingu einki gjørt. Umborð hjá okkum stóð illa til, at hugsingur ikki var um at leita.

## Stóð illa til

Mortan heldur, at tað var ein hægri makt, sum hendan 31. januar 1959 leiddi Fiskanes við manningini úr hesum illveðri.

- Hans Hedtoft var á síni jomfrúferð, tá skipið fórst. Hetta var fyrsti túrur á veg úr Grønlandi til Danmarkar. Skipið varð bygt í somu dokk, sum Brandur Sigmundarsson varð bygdur eitt ár seinni.

Hann heldur, at ein orsøk til, at Hans Hedtoft fórst, var, at skipið helt leiðina fram eystureftir, har ísurin gjørdist tjúkri og tjúkri.

- Men tað var ikki lætt hjá teimum heldur, tí Prins Christiansund hevði sagt, at eingin ísur var á leiðini. Á brúnni umborð á Fiskanesi vóru Hans Pauli og Pole Johannesen og hvalbingurin, Dánjal Jákup Berg. Vit hildu í fyrstani somu leið sum Hans Hedtoft, men sóu, at tað versnaði við ísi, og tí hildu vit aftur og andøvdu vestureftir.

Mortan sigur, at sum 16 ára gamal var hann ikki óttafullur, tá harðast leikaði á – helst tí, at hann sum so ungur ikki dugdi nóg væl at meta um støðuna.

- Eg minnist, at Hans Pauli ta einu løtuna rópti av brúnni og niður á dekkið, at nú stendur ikki væl til hjá okkum.

## Skóru mastrina

Hann sigur, at tveir íslendskir trolarar eisini vóru staddir á Labrador-leiðini og komu í sama illveður sum teir. Tann eini av hesum, ið kallaðist July, gekk burtur við allari manningini. Hin kallaðist Torkil Máni og kom við neyð og deyð burtur úr illveðrinum.

- Tann stóri trupulleikin var ísurin, bæði á sjónum og so yvirísingin av sjóroki og kuldanum, sum var. Umborð á Torkil Mána brendu teir dávid'arnar og mastur av við skeribrennara, og teir koppaðu eisini bjarging-